# LEIKSKRÁ

14. JUNI 2025

SKRÁ NR. 5




ODDUR Á LAKJUNI

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN

# 13. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur

Atli Petersen
Jan Ó. Ellingsgaard

**Myndir**
Oddur á Lakjuni

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen

MOWI



FAROE ISLANDS

# RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY **NATURE**

Allur heimurin veit tað. Og vit í Føroyum vita tað.
Laksur úr Føroyum er heimsins besti.

Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO

# INNIHALD

Dysturin í dag

Støðan í
1. deild

TEAM
ÍF

TEAM
B36

Dómarar

Frægi
bóltspælarin Sam

ÍF-sangurin



ODDUR Á LAKJUNI

FORSÍÐA




pelagos.fo

PELAGOS
PELAGIC FISH FROM THE FAROE ISLANDS



TEKST: **BIRGIR PETERSEN**

# VÆLKOMIN Á FLØTUGERÐ!

Gestirnir í dag er næstbesta liði hjá árstalsfelag-num úr Havnini, B36. Tað hevur ikki hilnast væl hjá teimum, tí teir eru botnproppur saman við 07 Vestur, har bæði liðini hava bert fingið 4 stig til høldar.

Tí er tað nokk ikki at taka munnin ov fullan, tá man sigur at eitt krav er til okkara menn er ein sigur. Helst um vit skulu varðveita vónina um eina uppflyting í ár.

Latum okkum tí stuðla og rópa á okkara dreingir!

***KOYRIÐ Á DRONGIR***



VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

EFTIR 12 UMFØR

# STØÐAN

## Í 1. DEILD HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála ÍF | 12 | 11 | 1 | 0 | 40 | 4 | 36 | 34 |
| 2 | AB | 12 | 9 | 2 | 1 | 25 | 10 | 15 | 29 |
| 3 | B71 | 12 | 9 | 0 | 3 | 21 | 15 | 6 | 27 |
| 4 | ÍF | 12 | 5 | 2 | 5 | 24 | 24 | 0 | 17 |
| 5 | Víking | 12 | 5 | 1 | 6 | 23 | 21 | 2 | 16 |
| 6 | EB/Streym | 12 | 5 | 1 | 6 | 15 | 26 | -11 | 16 |
| 7 | NSÍ | 12 | 4 | 1 | 7 | 20 | 21 | -1 | 13 |
| 8 | KÍ | 12 | 4 | 1 | 7 | 16 | 25 | -9 | 13 |
| 9 | 07 Vestur | 12 | 1 | 1 | 10 | 13 | 29 | -16 | 4 |
| 10 | B36 | 12 | 0 | 4 | 8 | 11 | 33 | -22 | 4 |

## 13. UMFAR

| | |
|---|---|
| 13.06.25 | 07 Vestur - B71 |
| 13.06.25 | EB/Streymur - Víkingur |
| 13.06.25 | KÍ - NSÍ |
| 14.06.25 | ÍF - B36 |
| 14.06.25 | AB - Skála ÍF |

## 14. UMFAR

| | |
|---|---|
| 20.06.25 | EB/Streymur - Skála ÍF |
| 21.06.25 | B36 - B71 |
| 21.06.25 | Víkingur - NSÍ |
| 21.06.25 | AB - 07 Vestur |
| 21.06.25 | ÍF - KÍ |

| | |
|---|---|
| Jákup Jónsson **Nolsøe** | 1 |
| Rógvi Ey. **Jacobsen** | 2 |
| Kári **Johannesen** | 3 |
| Bjarti Jøkladal **Højbro** | 4 |
| Jákup **í Lambanum** | 5 |
| Karl Abrahamsson **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Olaf Karstensson **Hansen** | 8 |
| Rúnar **Johnsson** | 9 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Jógvan **á Lakjuni** | 13 |
| Tóri Tormóðsson **Traðará** | 15 |
| Jóhann **Jøkladal Højbro** | 16 |
| Aron **Kensson** | 17 |
| Petur Meinhard **Lundsbjerg** | 18 |
| Atli **Djurhuus Petersen** | 19 |
| Rógvi **Matras** | 20 |
| Jákup Andrias **Thomsen** | 21 |
| Bergur **Jacobsen** | 22 |
| Regin **Taye Lassaberg** | 23 |

Høvuðsvenjari: **Kristoffer Kvistgaard**
Málmansvenjari: **Sjúrður Hovland Petersen**
Fysiskur venjari: **Gunnar Hjelm**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**
Liðleiðari: **Rói Dalsá Olsen**

**INNIHALD**

| | |
|---|---|
| Daniel **Borentzvige** (M) | 1 |
| Sebastian **Gullfoss** | 2 |
| Tobias **Hansen** | 3 |
| Markus **Hellisdal** | 4 |
| Elias **Johannesen** | 5 |
| Baldur **Niclasen** | 6 |
| Djóni **Sivertsen** | 7 |
| Eli **Nielsen** | 8 |
| Stefan **Djumic** | 11 |

| | |
|---|---|
| Dennis **Anghel** | 13 |
| Jógvan **Gullfoss** | 14 |
| Heini **Guttesen** | 15 |
| Heini **Hentze** | 16 |
| Dávid **Viderø** | 17 |
| Nils **Eiriksson** | 18 |
| Rói **Waag Ólavsson** | 20 |
| Tórur **Eið Eliasen** | 27 |

Venjari: **Tór-Ingar Akselsen**
Hjálparvenjari: **Dánial Pauli Lervig**

INNIHALD



DÓMARI

Eiler **Rasmussen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Pætur **Ellingsgaard Rasmussen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Gunnar **Eihilt Sivertsen**

magn




SPEKT
løggildir
grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo






# INNIHALD

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99





# Frægi bóltspælarin Sam

EFTIR: SIGNAR Á BRÚNNI

Í 2019 andaðist (lítli) Sam, 71 ára gamal.
Sam var arbeiðsformaður hjá kommununi í heili 42 ár, og ta uppgávuna røktaði hann væl og virðiliga.
Sam var so gávuríkur. Hann var musikalskur, spældi uppá fleiri ljóðaføri, gittara, fiól o.a. Hann spældi í orkestrinum, Silly Boys, ið taldist millum tey bestu í landinum. Í Thaborkórinum var hann eisini.

Men Sam dugdi so nógv annað, m.a.  at spæla fótbólt, og tað er ikki ov nógv sagt at hann var ein úrmælingur, ið skilti seg frá hinum spælarunum við sínum serliga máta at spæla uppá. Spælið skuldi verða vakurt og undirhaldandi. Hann dugdi at taka bóltin niður við bringuni, hann dugdi at skalla bóltin við tí kós, ið hann ætlaði og hóast lágur av vøkstri, so kom hann næstan altíð hægst upp og vann bóltin. Jú, tað var ein sonn fragd at síggja hann spæla, og vit aðrir á liðnum kundu læra av honum.

Sam var hóvligur og skemtingarsamur og setti sín dám á, har hann var og væl dámdur av øllum. Í umklæðisrúminum var altíð látur og gott samanhald, og parturin hjá Sam lá ikki eftir.

Nógv er hent á ítróttarøkinum í Fuglafirði seinastu árini. Nýtt snotuligt ítróttarhús er gjørt, og nógvar eru eldsálirnar, kvinnur sum menn, ið gera eitt megnararbeiði fyri ÍF, sum heilt vist fer at kasta av sær í komandi tíðum.

Sam hevði sín ávirkan á yngru spælarnar, hann var fyrimyndin av einum dugnaligum fótbóltsspælara, ið seint verður gloymdur.

Tú kanst lesa meira um Sam á heimasíðuni
hjá ÍF **www.if.fo.**

BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60






ÍF-LEIKSKRÁ

# INNIHALD

13. UMFAR **2025**

E&B VIRKIÐ

# TAKK FYRI STUÐULIN

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**